# mistu



*Fólk, sum høvdu tilknýti til virkið hjá Salm Pro í Fuglafirði, føla, at tey mistu á stokkinum, tí ætlanin var nevniliga at taka framleiðsluna uppaftur týsdagin eftir páskir*

partabrøvini í Havsbrún. Avtalan er eitt nú treytað av, at myndugleikarnir góðkenna søluna.

- Jú, vit føla tað, sum um vit mistu á stokkinum. Eg havi skilt, at avtalur um keyp av portiónum vóru komnar upp á pláss, og vit skuldu byrja týsdagin eftir páskir, sigur ein av teimum, sum var fastløntur hjá Salm Pro.

Tað vóru stjórarnir á Viking Seafood á Strondum og Faroe Farming í Suðuroy, Brandur Jacobsen og Erhard Joensen, sum nú søgdu teimum fastløntu á Salm Pro úr starvi.

- Heldur ikki teir søgdu seg vita meiri enn tað, sum sagt hevur verið í fjølmiðlunum um avtaluna millum Bakkafrost og Havsbrún, sigur arbeiðsfólkið, sum Sosialurin hevur tosað við.

Millum tey uppsøgdu er eisini stjórin á Salm Pro, Jákup Eli Thomsen. Hini eru maskinfólk, skrivstovufólk og arbeiðs-formaður.

Sum vit nevndu, keypti Viking Seafood og Faroe Farming triðingin, sum Faroe Seafood átti í virkinum í Fuglafirði. Tí lá tað í hondunum á Brandi og Erhardi at siga teimum fastløntu úr starvi.

Tey, sum vóru fastløntu hjá Salm Pro, men sum nú eru søgd úr starvi, hava eina uppsagnartíð á tríggjar mánaðir.

Hjá teimum og hinum øllum, sum áður starvaðust á virkinum, liggur í løtuni alt í tí óvissa.

*vilmund@sosialurin.fo*



*– Árini síðan 2008 er marknaðurin í USA vaksin nógv. Í fjør endaði hin størri helmingurin av okkara fiski har yviri, sigur Erhard Joensen, stjóri í Faroe Farming*

# – Okkara partur er hin sami

**Hóast Bakkafrost keypir partapeningin í Havsbrún og soleiðis eisini tey 78%, sum Havsbrún eigur í Faroe Farming í Suðuroy, eigur Suðuraling tó framvegis síni 22% í fyritøkuni. – Í so máta eru eigaraviðurskiftini fyri okkara viðkomandi ikki broytt, sigur Erhard Joensen, stjóri í Faroe Farming í Suðuroy**

Vilmund Jacobsen

Stórar rembingar eru á vinnuøkinum í Føroyum í løtuni. Nógv skip og fiskavirkir eru seld.

Fyrr í ár keypti eitt stórt samtak í Eysturoy saman við íslendingum seks ísfiskatrolarar og fýra virkir. Norðoyingar hava keypt fleiri skip, sum í fyrsta lagi skulu tryggja Kósavirkinum sítt ráfiskagrundarlag. Hin seinasti - og ivaleyst nógv tann størsti handilin – er, at Bakkafrost keypir øll partabrøvini í Havsbrún fyri 1,1 miljard krónur.

Í Suðuroy spyrja fólk, hvussu framtíðin hjá ali- og kryvjifelagnum, Faroe Farming, fer at síggja út, nú eigaraviðurskiftini verða broytt.

Erhard Joensen, stjóri í Faroe Farming, sum hevur aling og kryvjivirkið í Suðuroy, sigur, at virksemið hjá teimum verður óbroytt og hitt sama – í øllum førum fram til í juli, tá formalitetirnir við nýggju eigaraviðurskiftunum ætlandi koma upp á pláss.



### Parturin hin sami

- Suðuraling eigur framvegis síni 22% í Faroe Farming, og í so máta er einki broytt. Havsbrún eigur síni 78%, sum Bakkafrost nú hevur gjørt avtalu um at keypa. Vit vita einki um nakrar broytingar, tí enn er keypsavtalan, sum skal gerast virkin í summar, so nýggj. Vilja nýggju eigararnir tað sama sum vit, verður einki broytt. Vit hava á pappírinum ikki minni ávirkan á virksemi, enn vit høvdu, áðrenn Bakkafrost gjørdi keypsavtaluna.

Stjórin sigur, at Faroe Farming keypti stóra flakavirkið í Vági frá samtakinum, sum keypti tey fýra virkini hjá Faroe Seafood, og hesi viðurskifti eru komin upp á pláss.

– Vit arbeiða tó framvegis í gomlu hølunum, men ætlanin hevur verið eftir ávísar ábøtur á fiskavirkinum at flyta sláturvirksemið í nýggju hølini seinni í summar ella tíðliga í heyst.

### 5.000 tons í ár

Erhard Joensen sigur, at Faroe Farming væntar at taka umleið 5.000 tons av laksi í 2011.

– Vit hava tikið eini 600 tons higartil í ár, men ætlanin er at byrja tøkuna aftur 2. mai.

Stjórin sigur, at ein góður helmingur av laksinum, sum tikin hevur verið í Suðuroy seinasta árið, er seldur á amerikanska marknaðinum, meðan restin er farin til ES.

– Árini síðan 2008 er marknaðurin í USA vaksin nógv, og eg vil siga, at hin størri helmingurin av okkara fiski – út við 60% - endaði har yviri í fjør, sigur Erhard Joensen, stjóri í Faroe Farming.

Tað er sølufelagið Salmex, sum Faroe Farming eigur saman við Viking Seafood, ið hevur tikið sær av søluni.

*vilmund@sosialurin.fo*